# Blaðmannafelagið tikið málið upp



*- Eg varð bilsin av, at plássini vórðu strikað, uttan at vit fingu tað til hoyringar, sigur Heini Gaard, formaður Blaðmannafelagsins*

**Formaðurin í Blaðmannafelagnum, Heini Gaard, visti ikki um, at føroyingar høvdu mist síni pláss á Journalistháskúlanum, fyrr enn hann hoyrdi tað í Útvarpinum. Felagið hevur nú tikið málið upp, men vónirnar um at fáa kvotuna aftur, eru ikki góðar**

FJØLMIÐLAR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

- Eg varð bilsin av, at plássini vórðu strikað, uttan at vit fingu tað til hoyringar.

Tað sigur Heini Gaard, formaður í Føroya Blaðmannafelag, nú tað herfyri frættist, at føroyingar ikki longur høvdu rætt til tvey pláss á Danmarks Journalisthøjskole í Århus.

Heini Gaard sigur, at tað ikki var fyrr enn Høgni Djurhuus bar hesi tíðindi í Útvarpinum, at hann visti av hesum.

Formaðurin heldur tað ikki vera nøktandi, at føroyingar hava mist hesi bæði plássini uttan fáa nakað afturfyri, sum hann málber seg.

Tí hevur Blaðmannafelagið nú vent sær til Journalistháskulan og Danmarks Journalistforbund. Hvat felagið nágreiniliga hevur samskift við hesar partarnar um, vil Heini Gaard ikki koma so nógv inn á, av tí tingast verður í løtuni um málið. Men hann sigur so mikið, at samband er millum partarnar, og stjórin á Danmarks Journalisthøjskole hevur lovað at viðgjørt eitt bræv við vælvild, har Blaðmannafelagið greiðir frá sínum sjónarmiðum.

Heini Gaard sigur seg tó ikki vænta, at stórvegis kjansur er at varðveita ta kvotuna vit hava havt.

- Kvota er ikki eitt pent orð, men tey hava forstáilsi fyri, at føroyingar ikki hava somu fortreytir sum danir at loysa uppgávurnar til upptøkuroyndina, sigur Heini Gaard.

### Føroysk útbúgving besta loysnin

Tí kundi ein møguleiki verið, at teir føroyingar, sum ikki koma inn beinleiðis við at vera millum teir bestu umsøkjararnar, kanska kunnu fáa eitt slag av framíhjárætti millum tey, ið sleppa til samrøðu, áðrenn støða verður tikin til, um tey skulu verða tikin inn á skúlan.

- Ein kann ikki krevja, at føroyskur ungdómur skal fylgja eins væl við í donskum viðurskiftum og danskur ungdómur, sigur Heini Gaard.

Sjálvur hevur Heini Gaard tó ta meining – og tað er ikki almenna støða Blaðmannafelagsins, sigur hann – at tað allarbesta hevði verið at havt eina føroyska útbúgving, av tí at trupulleikin er akuttur, sum hann tekur til. Bara umleið helvtin av føroyskum tíðindafólki er útbúgvin innan yrkið, og tí hevði lærugrein á Fróðskaparsetrinum verið besta loysnin. Eisini av tí, at tað er so torført at sleppa inn niðri, sigur Heini Gaard.

# Journalistútbúg

**Herdu krøvini hjá føroyskum umsøkjarum á danska Journalistháskúlan skulu**
**fakfelagsformaðurin Heini Gaard og fyrrveran**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Í blaðnum í gjár viðgjørdi Sosialurin útbúgvingarstøðið millum føroyskar journalistar. Spurningurin varð tikin upp orsakað av, at danska Undirvísingarmálaráðið saman við Danmarks Journalisthøjskole í mars í ár broytti reglurnar og strikaði tey bæði árligu plássini, sum føroyskir umsøkjarar fyrr hava havt rætt til. Avleiðingin av herdu upptøkukrøvunum kann vera, at útbúgvingarstøðið versnar. T. d. kom eingin av teimum tólv føroysku umsøkjarunum inn á Journalistháskúlan undir nýggju reglunum í ár.

Í blaðnum í gjár spurdu vit mentamálaráðharran Jógvan á Lakjuni og journalistarnar Una Arge og Øssur Winthereig um tørvin á føroyskari journalistútbúgving. Jógvan á Lakjuni lovaði at taka málið upp, meðan Uni Arge og Øssur Winthereig mæltu til at stovnseta føroyska journalistútbúgving.

Í dagsins blaði spyrja vit blaðstjórarnar Inga Samuelsen og Jan Muller, formann Blaðmannafelagsins Heina Gaard og fyrrverandi SvF-stjóran Árna Gregersen sama spurning. Blaðstjórarnir harmast báðir um avgerðina hjá donsku myndugleikunum. Heini Gaard sigur, at Blaðmannafelagið hevur tikið málið upp við Danmarks Journalisthøjskole og Dansk Journalistforbund. Og Árni Gregersen ávarar ímóti hálvum loysnum og mælir til føroyska journalistútbúgving treytað av, at politiski




myndugleikin játtar nóg mikið av peningi.

Tað er framvegis ikki eydnast at fáa viðmerking

# Føroysk journalistútbúgving krevur pengar á borðið

**- Ein føroysk journalistútbúgving er alneyðug, men virði á eini slíkari útbúgving stendur og fellur við viljanum hjá politiska myndugleikanum at játta nóg nógvan pening. Hálvar loysnir duga ikki, sigur fyrrverandi SvF-stjórin, Árni Gregersen**

FJØLMIÐLAR
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Ein føroysk journalistútbúgving skuldi verið sett á stovn í Føroyum ongantíð ov skjótt. Men ein slík útbúgving hevur einki virði, um fortreytirnar ikki eru í lagi. Tað metir fyrrverandi SvF-stjórin og núverandi sjónvarpsstjórin á Bornholm, Árni Gregersen.

- Eg taki fult undir við eini føroyskari journalistútbúgving. Men um hetta verður gjørt, uttan at politiski myndugleikin játtar nóg nógvan pening, og uttan at avvarðandi myndugleikar veruliga satsa, hevur ein slík útbúgving lítið virði, sigur Árni Gregersen.

Við øðrum orðum ávarar hann ímóti hálvum loysnum og hálvhjartaðum stigum, og tí stendur og fellur málið við viljanum hjá løggevandi valdinum.

### Innlit í føroyska samfelagið

Árni metir, at ein føroysk journalistútbúgving hevði verið ein stórur vinningur hjá føroyska samfelagnum.

- Um vit høvdu okkara egnu útbúgving, høvdu føroysk journalistlesandi t. d. verið sett inn í okkara egna lógarverk, sum er heilt øðrvísi enn donsk løgfrøði. Tað er ein trupulleiki, at allir útbúnu journalistar okkara útbúgva seg í londum, sum eru øðrvísi enn okkara. Tá hesi so koma heim at arbeiða í Føroyum, vita tey ov lítið um tað samfelag, tey skulu viðgera og lýsa hvønn dag, sigur Árni Gregersen.

Umframt, at føroyskir journalistar fingu størri innlit í sítt egna samfelag við eini føroyskari journalistútbúgving, metir Árni eisini, at hetta hevði skapt ein sterkari málførleika millum journalistar, sum sambært fyrrverandi sjónvarpsstjóranum er ein átroðkandi trupulleiki í dagsins tíðindaflutingi.

### Altjóða útbúgving

Men hóast ein føroysk journalistútbúgving fyrst og fremst skal taka støði í føroyska samfelagnum, metir Árni tað vera alneyðugt at skapa ein altjóða profil.

- Umframt fak í altjóða viðurskiftum kundi Setrið fingið útlendskar kapasitetar til Føroya at undirvíst, so útbúgvingin hevði eina altjóða dimensión, metir Árni.

Hann heldur ikki, at nýggju reglurnar á Danmarks Journalisthøjskole, sum avmarkað møguleikan hjá føroyskum umsøkjarum at sleppa inn, er nøkur vanlukka. Bæði Syddansk Universitet í Odense og Roskilde Universitetscenter hava útbúgvingar í journalistikki, og Árni sigur, at bestu royndir hansara á sjónvarpsstøðini á Bornholm eru við journalistum, sum eru klaktir á RUC. Og so ber eisini til at lesa aðrastaðni enn í Danmark, sum fleiri og fleiri eisini gera.

- Men grundgevingin um etniska javnstøðu er burturvið. Ein føroyingur í Danmark kann als ikki samanberast við ein pakistana, tí vit eru



danskir statsborgarar, sum kortini búgva í okkara egna samfelagi, slær Árni fast.

### Tvær milliónir ov lítið

Í útvarpsinnslagi í seinastu viku metti rektarin á Fróðskaparsetrinum, Jóan Pauli Joensen, at ein journalistútbúgving kundi koma at kosta um tvær milliónir árliga. Men Árni ristir við høvdinum at hesi upphædd.

- Ein dygdargóð journalistútbúgving kostar meiri enn tvær milliónir um árið. Umframt løn til undirvísarar krevst nýmótans tøknifrøðilig útgerð, serliga um næmingar skulu fáa roynd-ir við loftmiðlum, og við hesum í huga ljóða tvær milliónir ov lítið í mínum oyrum, sigur Árni Gregersen at enda.